

# Robbie Williams

**Ótrúliga populeri undirhaldskongurin úr Onglandi, 29 ár og superstjørna. Robbie Williams ger nógv um seg á sjónvarpsskíggjanum. BBC Prime vísir leygarkvøldið dokumentarsending um Robbie Williams og í heyst vísir eisini TvDanmark1 eina heilt serliga og nýggja konsertsframleiðslu.**

Tað koyrir rættiliga væl hjá unga bretanum Robbie Williams. Seinasta fløgan Escapology hevur selt yvir fimm milliónir yvir allan heimin og nærvið allar konsertirnar á hansara seinasta konserttúri, sum eitur Escapolgy Tour, eru útseldar. Í Onglandi hevur Robbie sligið gamla metið hjá Oasis í skjótastu útsøluna av atgongumerkjum - tað metið var sjey tímar. Tær tríggjar eyka konsertirnar hjá honum, sum vóru settar afturat fyrst í august, vórðu útseldar eftir bara tveimum tímum.
Men altíð hevur tað ikki gingið so væl. Hansara lív er merkt av upp- og niðurtúrum. Sendingin á BBC Prime Robbie Williams snýr seg um árið 1998, sum var eitt hendingarríkt ár hjá honum. Tá var hann í ferð við sína næstu soloútgávu. Í sendingini talar hann út og vit síggja eisini, sjálvandi, tann undirhaldandi Robbie. M.a. syngur hann saman við pápa sínum, Pete Conway. Hesin arbeiðir eisini innanfyri undirhaldsbransjuna, hetta hevur hann gjørt í yvir 35 ár. Eftir hesa sendingina fekk tann 53 ára gamli rættiligan vind í seglini og bleiv nógv meiri umbiðin.
Eftir eina suksesfylta og púra útselda konsert í Parkini í Keypmannahavn 25. juli, har Moby hitaði upp, fór Robbie aftur yvir til Onglands. Har skuldi hann framføra tríggjar dagar á rað á Knebworth stuttleikaparkini. Knebworth Park er ein spennandi og annarleiðis stuttleikapark, sum liggur uttanfyri London og er samstundis ein upplagdur pallur fyri tí størsta og tí mest ambitiøsa konserttiltakinum nakrantíð hjá Robbie Williams. Hamish Hamilton, sum m.a. hevur instruerað seinastu Elevation Tour konsertirnar hjá U2 og konsertir hjá Madonnu, hevur instruera evopiiska partin av Escapalogy Tour. TvDanmark hevur keypt rættindini til hesar uttandurakonsertirnar, ið verða grund undir tí konsertfilminum, sum verður vístur í heyst á TvDanmark1.

